# LØGTINGSLÓG NR. 77 FRÁ 12. JULI 1984 UM BANN MÓTI BURTURKOYRING AV MOLD TIL SJÓS / OM FORBUD MOD AT DUMPE JORD I HAVET.

**Løgtingslóg nr. 77 frá 12.07.1984**

Broytingar eftir 1. januar 1999 og kunngerðir

**§ 1.** Tað er bannað at forkoma mold, leiri og øðrum tilfari frá útgrevstri, vegagerð og tilíkum við at koyra slíkt tilfar til sjós.

**§ 2.** Øll býráð og bygdarráð hava skyldu til at ávísa øki, har mold og tilfar frá útgrevstrum og vegagerð o.t. kann leggjast.

**§ 3.** Landsstýrið kann við kunngerð áseta aðrar reglur um útinning av lógini.

**§ 4.** Brot á reglurnar í § 1 og á reglurnar ásettar við heimild í § 3 verða revsað við bót.

**§ 5.** Henda lóg kemur í gildi 1. juli 1984.